


## 1950'ini

Fyrsti príslistin kemur á gøtuna í 1951, og Ikea leggur seg eftir konseptinum, sum vit kenna enn í dag, við góðsku fyri lítlan penga. Ingvar Kamprad letur eina sølustevnu upp, har hugtøkini um »flatar eskjur« og »samla själv« síggja dagsins ljós á fyrsta sinni. Búskaparliga eru tíðirnar slakar, men innrættingin av stovuni broytist um hetta mundið, nú sjónvarpið er vorið nýggja húsaltarið í modernaða heiminum. Síðst í 50'unum letur fyrsta stóra Ikea handilshúsið upp í Svøríki, og omanfyri 100 fólk eru í starvi.




## 1960'ini

Tíðirnar batna og fólkið hevur meiri pening til forbrúk. Fleiri túsund fólk standa í røð við dyrnar, tá eitt risastórt Ikea handilshús letur upp í Stockholm. Sjálvtøkuvørugoymslan verður fastur táttur í Ikea-konseptinum. Sjónvarpið er í litum, og fyrsta Ikea-húsið letur upp í Ballerup í Danmark í 1969.




## 1970'ini

Ingvar Kamprad flytir til Danmarkar í 1973 fyri at vera nærri europeiska marknaðinum. Nýggj handilshús lata upp í Sveis, Týsklandi, Autralia og í Canada. Stílurin er flipputtur og á nógvan hátt kollveltandi.




## 1980'ini

Í 1984 verður katalogið prentað í 45 milliónum eintøkum á níggju ymsum málum. IKEA FAMILY verður til, og fyrstu umhvørvissamskiparin verður settur í starv í fyritøkuni. Handlar lata upp í Fraklandi, Belgia, USA, Bretlandi og í Italia.




## 1990'ini

Fyritøkan satsar upp á fólk, burðardygd og umhvørvi. IKEA CHILD verður til, nú tørvurin hjá børnum er í hásæti. Fyritøkan fær nógva umrøðu í sambandi við røðina Democratic Design, ið setir gongd á missiónina um eitt gott og funktionelt design, sum fjøldin er før fyri at rinda.




## 00'ini

Hugtøk sum sosial ábyrgd og umhvørvisvernd eru framvegis í hásæti. Millum annað við »IKEA Social Initiative«, og »Better Cotton Initiative«, sum er samstarv við WWF. Eisini á globala pallinum er fyritøkan virkin, til dømis saman við Red Barnet (Save the Children) og UNICEF. Handilshús nummar 200 letur upp og starvsfólk nummar 100.000 verður sett í starv.